# Fólkatónleikarar úr Álandi vitja

**Seinni í vikuni kemur álendski fólkatónleikarabólkurin, SKRÅ, á vitjan í Føroyum. Bólkurin verður nevndur hin djarvi fólkatónleikarabólkurin úr Álandi**

KONSERT
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

SKRÅ, sum luttóku á G! í 2006, hava spælt saman í meira enn fýra ár og hava altíð roynt at hildið fast í sínar norðurlendsku røtur, samstundis sum teir hava latið seg ávirkað av rákinum uttanífrá, skrivar Norðurlandahúsið í tíðindakrivi.

Bólkurin hevur spælt í ymsum londum, tó mest í Álandi. SKRÅ vunnu við stórum meiriluta álendsku tónlistakappingina Music. ax í 2006, ið NIIPA skipaði fyri. Hugskotið til kappingini kom frá Stefan Simonsen og gomlu føroysku Prix Føroyar kappingini.

Fyrsta konsertin hjá SKRÅ verður hóskvøldið 3. apríl klokkan 20 í Havnar Klubba, sum klubbin, Fólkatónleikarafelagið og Norðurlandahúsið skipa fyri, har eisini møguleiki verður at hoyra aðrar føroyskar fólkatónleikarar og fólkadansarar.

Næsta konsertin verður í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið 4. apríl klokkan 20. Konsertin er skipað sum eitt samstarv millum Klaksvíkar Kommunu, Atlantis og Norðurlandahúsið í sambandi við, at Klaksvíkar Kommuna fyllir 100 ár og Norðurlandahúsið verður 25 ár.

Tann triðja konsertin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 5. apríl klokka 16, samstundis sum ein stór álendsk listaframsýning letur upp. Allar konsertirnar eru almennar.

Seinasta konsertin verður seinni leygarkvøldið á Bryggjuni í Vestmanna. Hendan konsertin byrjar klokkan 22.


*Álendski bólkurin SKRÅ skal hava tríggjar konsertir í Føroyum í hesi vikuni*


## HANDILSLÆRLINGUR

Vit sóknast eftir einum lærlingi til okkara HVS-handil.

**Tín førleiki**
Vit vóna at tú ert fyrikomandi, íðin, nærlagdur, sjálvstøðugur og skilur týdningin av góðari kundarøkt. FHS ella onnur miðnámsútbúgving er ein fyrimunur.

**Afturfyri bjóða vit**
Eitt starv har ið tú saman við øðrum kemur at taka tær einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fært møguleika at hjálpa og leiðbeina kundum okkara, samstundis sum tú fært ábyrgd og møguleika til at menna okkara handil – Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, **týsdagin 8. apríl.**

Um tú hevur spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á tel. 312 000

**MARIA POULSEN PF**
Postmoga 182
FO-110 Tórshavn



Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo


# Steven Curtis Chapman til Føroyar

**Teir føroyingar, ið dáma væl gospeltónleik, hava helst bert droymt um at sleppa á eina konsert við navnframa sangaranum Steven Curtis Chapman. Í summar verður hesin møguleikin til staðar og tað enntá í Føroyum**

KONSERT
*Snorri Brend*

**Í Skálafirði:** Á heimasíðu hansara stendur skrivað, at hann skal hava konsert í Føroyum leygardagin 30. august. Hetta er partur av longri konsertferð, har hann bæði skal vitja í Kina og í USA. Hann kemur til Føroyar eftir eina konsert í Houston í Texas og skal síðani aftur hava konsert á øðrum staði í Texas eftir Føroyavitjanina.

Ein av monnunum aftanfyri Fjarðafestivalin, Eyðun Jacobsen váttar at hesin festivalurin verður hildin um somu tíð í Skálafirði. Men hann hevur annars ikki aðrar viðmerkingar til málið.



*Seinasta fløga hansara "This Moment" kom út í fjør og fekk sera góð ummæli*

Steven Curtis Chapman er føddur í 1962 og byrjaði yrkisleið sína sum tónleikari seinast í 80'unum og hevur higartil útgivið omanfyri 20 album. Bara í fjør seldi hann fleiri enn 10 mió eintøk av útgávum sínum.

Steven hevur, umframt tónleikin eisini stundir til vælgerandi endamál og hevur stovnað felagsskapin Shaohanna's Hope. Hann er harafturat giftur við Mary Beth og hava tey ættleidd tríggjar gentur úr Kina.

Sum skilst koma The Isaacs, sum eru kendir í Gaither-samanhangi, eisini á Fjarðafestivalin. Hetta sæst á heimasíðu teirra, har sagt verður at teir skulu hava konsertir bæði 29. august og 31. august í Skálafirði.